## Spennandi við kvinnuligum forseta

*Undanfarni ÍSF-forseti peikaði á teg sum nýggjan forseta í 1980. Hvønn peikar tú á sum nýggjan ÍSF-forseta?*
- Eg royni at halda meg neutralan. Vit hava tvey góð valevni í Sølva Reinert Hansen og Annsy Høghamar. Tey hava bæði verið virkin í ítrótti, og eg dugi illa at taka annan fram um hin. Alíkavæl haldi eg, at tað er sera spennandi, at tað nú er ein kvinna, sum bjóðar seg fram. Vit hava havt ov fáar kvinnur við í arbeiðnum hjá ÍSF, og tí ger tað einki, um kvinnurnar nú eisini sleppa at gera vart við seg. Men líkamikið hvat eg sigi, so eru tað feløgini kring landið, sum skulu velja nýggja ÍSF-forsetan, og eg fari at ynska teimum báðum góða eydnu við valinum, sigur Heðin Mortensen



# Tað kan ganga hart fyri seg

**Hevur tað riggað at verið politikari og ÍSF-forseti samstundis? Hevur hann havt stundir til at røkja ÍSF-forsetastarvið? Og hvønn peikar hann á sum nyggjan ÍSF-forseta? Tað vóru nakrir av spurningunum, vit settu, tá ið vit hittu Heðin Mortensen fyri at seta punktum fyri 28 ár sum forseti í føroyskum ítrótti. Hann minnist best góðu løturnar, men viðurkennir, at tað kann eisini ganga hart fyri seg viðhvørt**

## Ítróttarprofilur



**Eyðun Klakstein**
eydun@sosialurin.fo

Leygardagin endar ein drúgt tíðarskeið í føroyskari ítróttarsøgu. Eftir 28 ár sum formaður og forseti fyri føroyskan ítrótt, takkar Heðin Mortensen fyri seg.

Ítróttarpolitikarin, sum hevur verið eyðsýndur í føroyska samfelagnum í fleiri ártíggjund, setir punktum fyri sítt forsetaskeið í Ítróttarsambandi Føroya, og eitt nýtt fólk skal taka við eftir hann.

- Eg kundi saktans hildið fram – eg hevði tímað tað – men seinastu tvey árini havi eg innstillað meg uppá, at nú skuldi tað enda. Eg havi trappað niður seinastu tvey árini, og tá haldi eg, at mann endar á rættan og virðiligan hátt. Tað hevur gingið væl sum forseti, ítrótturin er á toppinum, og tí er tað hóskandi at gevast nú, sigur Heðin Mortensen.

Tað var í 1980, at hann fyrstu ferð varð valdur til formann í Ítróttarsambandi Føroya, men tað var meira ella minni av tilvild, at hann endaði uppi í nevndararbeiðnum í ÍSF.

- Eg setti ikki nøsina upp eftir at blíva forseti í ÍSF, men eg hevði verið aktivur í ítrótti – einamest í kappróðri – og tað tíðarskeiðið, sum eg kom uppí ÍSF, var eg nevndarformaður í Havnar Róðrarfelag, greiðir hann frá.

- Eg kom upp í nevndina í ÍSF sum skrivari av fyrstan tíð. Tað var í 1979. Eg og Jean Dimon vóru í uppskoti sum skrivarar, so tað var kampval. Atkvøðugreislan endaði við javnleiki millum okkum báðar, og so var tað formansatkvøðan, sum var avgerandi fyri valið. Øll eygu vórðu so vend ímóti Jógvan Arge, sum var ÍSF-formaður, og hann valdi meg.

- Eg fór inn í arbeiðið í ÍSF av heilum hjarta, og eg helt tað vera sera spennandi. Tá Jógvan Arge fór frá sum formaður longu árið eftir, skjeyt hann meg upp sum nýggjan formann í ÍSF, og eg varð valdur uttan mótvalevni.

- Størsta avbjóðingin í føroyskum ítrótti, tá eg kom upp í ÍSF, var C-HM í hondbólti, og vit høvdu eisini eina stóra norðurlendska fimleikastevnu í Føroyum um tað mundið.

### Ítróttarveddingin givið nógv

Føroyska ítróttarlandslagið broyttist nógv næstu árini, tí nú fóru ítróttargreinarnar at stovnseta síni egnu sersambond, sum skuldu hava ábyrgdina av ítróttargreinini.

- Áðrenn vóru allar ítróttargreinarnar deildir undir ÍSF, og í grundini hevði starvsnevndin hjá ÍSF ábyrgdina av at skipa fyri øllum ítróttargreinunum. Stutt eftir at eg gjørdist ÍSF-forseti fingu vit seks sersambond, og nú hava vit 15 sersambond, sum hava ábyrgdina av teirra ítróttargrein. Hetta hevur verið ein góð og natúrlig menning í føroyskum ítrótti, sigur Heðin Mortensen.

Tað hava verið nógvar spennandi løtur sum ÍSF-forseti hesi 28 árini, og Heðin Mortensen heldur, at tað ber ikki til at taka eina einstaka hending burtur úr, sum ta størstu, men hann er glaður fyri veddingapengarnar, sum føroyskur ítróttur fær á hvørjum ári.

- Ítróttarveddingini er nakað av tí størsta, sum eg havi verið við til at gjørt til frama fyri føroyskum ítrótti. Fyrst royndu vit við egnari vedding, men tað riggaði ikki, tí grundarlagið var ov lítið. Tí fóru vit í eitt samstarv við Dansk Tipstjenste, og hóast tað var nógv politisk rok av hesum, so eydnaðist tað at enda at fáa hetta samstarvið at rigga.

- Samstarvið við Danskt Tipstjenste hevur verið gott, og ítróttarveddingin gevur føroyskum ítrótti 5 ella 6 milliónir krónur á hvørjum ári. Vit fáa bara góðar tvær milliónir krónur á fíggjarlógini, so høvdu vit ikki veddingina, so hevði tað verið fátæksligt í føroyskum ítrótti.

### Meira umboðan enn makt

*Er ÍSF-forsetin blivin meira eitt umboð heldur enn ein veruligur maktpersónur í føroyskum ítrótti?*

- Tað kanst tú kanska siga, men vit hava eisini ítøkiliga ávirkan á ymisk mál. Millum annað samráðingar við almennu myndugleikarnar vegna allan ítróttin og annað. Men ÍSF-forsetin er í stóran mun ein almennur persónur, sum vísir seg í ítróttarsamanhangi og hjálpir til, har hann kann.

*Tá tú komst upp í ÍSF vóru allar ítróttargreinarnar savnaðar undir ÍSF. Nú hava vit sersambond, sum taka sær av ymsu ítróttargreinunum. Stendur føroysku ítróttur líka væl saman í dag, sum hann gjørdi tá?*

- Føroyskur ítróttur stendur væl saman, men áhugin í sersambondunum snýr seg fyrst og fremst um sína egnu ítróttargrein, og tað er einki løgið í tí. Soleiðis eru vit bara. Men tá vit hava stór felagsmál, sum verða tikin upp

## Fakta

**Navn**: Heðin Mortensen
**Aldur**: 62 ár
**Føddur**: Trongisvági
**Bústaður**: Tórshavn
**Familja**: Giftur við Hjørdis Egholm Mortensen.
Børn: Elin, Ann, Guðrun og Eirikur. 8 abbabørn.
**Starv**: Borgarstjóri í Tórshavnar Kommunu. Farloyvi frá Tryggingafelagnum Føroyum.